SORINSKRIVARIN Í FØROYUM

# Ørindadrongur/-genta

Á Dómaraskrivstovuni er eitt starv sum ørindadrongur/-genta leyst at søkja til setan skjótast gjørligt.

**Vit vænta:**
at tú ert fyrikomandi og hevur góð samstarvsevni.

**Løn og setanarviðurskifti:**
- Starvið er tímalønt og verður roknað við 400 tímum árliga.
- Løn og setanarviðurskifti sambært felagssáttmála millum Statsansattes kartel og Finansministeriet og sáttmála millum HK/STAT og Finansministeriet. Lønin er í løtuni 44,96 um tíman fyri 16 ára gomul.

Starvið fevnir um vanlig ørindi so sum banka- og postavgreiðsla og at koyra flaggið upp/niður halgidagar og niður aftaná arbeiðstíð, teir dagar flaggað verður.

Skrivlig umsókn skal vera Dómaraskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 24. februar 2006 kl. 12.00.

Umsóknir verða at senda Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, Box 28, FO-110 Tórshavn

**Domarin í Føroyum**
tann 6. februar 2006

Røktar- og umlættingarheimið

Lágargarður

# Summarfrítíðar-avloysar

Røktar- & Umlættingarheimið Lágargarður søkir eftir summarfrítíðaravloysarum í røkt, køk og reingerð í tíðini frá 1. juni til 31. august 2006 ella sambært nærri avtalu.

Fyri røktarstarvsfólk: Sjúkrarøktarfrøðingar og heilsurøktarar/sjúkrahjálparar.

Somuleiðis verður søkt eftir avloysarum fyri starvsfólki í køkinum: Økonoma ella køksassistentar við prógvi, umframt hjálparfólk til at avloysa tey, ið koyra døgurða út til heimabúgvandi pesionistar, tískil er koyrikort neyðugt.

Frítíðaravloysararnir eru tímaløntir, og lønin er sambært avtalu ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfeløg.

Umsóknarfreistin er 3. mars 2006.

Skrivligar umsóknir við neyðugum prógvum skulu sendast til leiðaran á

**Lágargarði**
Stoffalág 84
Box 118
110 Tórshavn

**Heimarøktin**
**og Serforsorgin**
*Serstovnadeildin*

# Pedagogur

## til Sambýlið á Bárðarfløtti, Vágur
## Farloyvisstarv

Undir Almanna- og heilsumálaráðnum og stovnum undir tí við fyribils tænastu á Sambýlinum á Bárðarfløtti verður søkt eftir pedagogi til farloyvisstarv til setan frá 15. mars 06 til 14. februar 07. ella eftir nærri avtalu

Talan er um fulltíðarstarv, og arbeiðstíðin er 40 tímar um vikuna.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi, kvøld-, náttar- og vikuskiftisvaktir.

Sambýlið á Bárðarfløtti er eitt heim, har 5 menningartarnaði fólk búgva. Búfólkini eru rímuliga væl fyri, men hava tørv á ráðgeving og vegleiðing í vanliga gerandisdegnum. Virðingin fyri einstaka búfólkinum og teirra tørvi verður høgt mettur í dagliga arbeiðinum.

Tann ið sett/ur verður, skal verða sálarliga og likamliga væl fyri, opin, erlig/ur, hava humoristiskan sans, evni og vilja til at samstarva og samskifta við starvsfelagar og avvarðandi. Hann/hon skal vera førur fyri at taka tær avbjóðingar sum koma og vera opin fyri nýhugsan.
Haraftrat er neyðugt at kunna arbeiða sjálvstøðugt, samstarva við aðrar fakbólkar, umframt at kunna taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

**Løn- og setunartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv, sett sambært avtalu millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið á lønarstigi 24, 25, 27, 28 og 30 til 33.

Um eingin pedagogur søkir, verða starvið sett við hjálparfólki sambært sátttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri upplýsingar um starvi fáast við at venda sær til leiðaran á stovninum á tlf. 374074.

**Umsókn**
Umsóknir við hjáløgdum próvskjølum, viðmælum og C.V. skulu sendast til:

**Sambýlið á Bárðarfløtti**
Att: Leiðarin
FO-900 Vágur

**Freistin at søkja starvið er mikudagin 1. mars 2006.**

Røktar- og umlættingarheimið

Lágargarður

# Fótarøktari

Røktar- & Umlættingarheimið Lágargarður søkir eftir fótarøktara við góðkenning at byrja sum skjótast ella sambært nærri avtalu.

Starvið er hálvtíðarstarv og lønt sambært avtalu ímillum heimið og viðkomandi umsøkjara.

Á Lágargarði er fótarøktarrúm við neyðugum amboðum, og skal fótarøktin viðgera búfólkið, ið býr á heiminum.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvi og góðkenning skal sendast til leiðaran á

**Lágargarði**
Stoffalág 84
Box 118
110 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 3. mars 2006.


**EL-VOGNUR 1300 KG**



**er vælegnaður til kontainarar**

**ER Á GOYMSLU**

**SP/F NORÐ TRUKK**
Mykinesgøta 3 · Postrúm 1315 · 110 Tórshavn
Tlf 315136 / 515136 · Fax 310931
E-mail: nordtruk@nordtrukk.fo

Umvæla allar bilskaðar og mangt annað



**Sp/f Plátuverkstaðið**
Tel 321778 ella 221778
www.plv.fo

Lesið Sosialin - so eru tit við